Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis og mentamálum

Evni: Heiðursskipan til útlendingar á mentanarøkinum

Spurningar:

Hevur landsstýrismaðurin umhugsað møguleikan at skipa soleiðis fyri, at tær almennu Føroyar kunnu veita útlendingum, ið stórliga hava stimbrað føroyskum ands- og mentanarlívi, onkran uppibornan heiður?

Viðmerkingar:

Í ands- og mentanarlívi okkara er tað serliga skaldskapurin, sum hevur avbjóðingar av, at vit eru partar av einum lutfalsliga lítlum máløki og harvið einum ógviliga avmarkaðum marknaði hvat ið sølu av t.d. bókum, ritum og tónsettum yrkingum á móðurmálinum viðvíkur.

Føroysk mentan hevur á tíðarinnar slóð átt nógvar góðar vinir í fremmandum londum. Serliga í grannalondunum. Føroyskur skaldskapur hevði ikki verið komin so víða um lond uttan leiklutin hjá týðarum í t.d. Danmark, Noreg, Svítjóð og Íslandi.

Tað ber illa til at umrøða mál sum hetta uttan at nevna Ebbu Hentze, sálu, sum serliga týddi samtíðar rithøvundarnar til danskt mál. Soleiðis varð hon beinleiðis orsøkin til, at fólk við øðrum tungumáli fingu møguleikan fyri at gerast kunnug við og at lesa føroyskan skaldskap. Tíbetur fekk hon almenna viðurkenning í Føroyum fyri hetta og fyri skaldskap úr egnum hondum.

Nú ein dagin frættist, at skaldsøgan “Glansbílætasamlararnir”, hjá Jóanesi Nielsen, var givin út á fronskum máli í Canada undir heitinum "Les collectionneurs d'images". Hon er týdd til franskt úr donsku týðingini hjá Povl Skårup, sum í aðrar mátar hevur verið føroyskum mentanarlívi mikið dugandi.

Vit plaga siga: Ongin nevndur - ongin gloymdur. Loyvi mær kortini at nevna norðmannin Lars Moa. Hann er maður sum ger lítið hóvasták burturúr sær sjálvum, men hann hevur ósjálvsøkið brúkt dagar, vikur, mánaðir og ár til tess at flyta føroyskan skaldskap av føroyskari tungu yvir á norska tungu. Mær vitandi hevur hann týtt ein trivaligan part av skaldskapi okkara til sítt egna mál.

Spyrjarans hugsan er, at Føroyar onkursvegna eiga at geva fólki í hesum andsstrevi eina viðurkenning og ein heiður frá teimum almennu Føroyum.

Á Løgtingi, 23. apríl 2021

Tórbjørn Jacobsen